# Føroysk gospel-diva



**Føroyska songkvinnan Linda Andrews hevur sungið kór hjá óteljandi kendum sangarum, men hon dugir sanniliga eisini sum solistur, og á Summar Festivalinum fer hon at bjóða eina rimmar framførslu við góðum gospeltónleiki**

Linda Andrews er gospelsongkvinna í serflokki

Carola, James Sampson, Johnny Logan, Soap, Blå Øjne, Guðrun Sólja, A-Teens og nógv fleiri hava havt gleðina av at hava Lindu Andrews sum kórsangara.

Føroyska songkvinnan, sum er búsitandi í Danmark, er ein nógv umbiðin kórsangari, og hon hevur framført til bæði Danish Music Awards og Grand Prix.

Sum solistur er Linda Andrews ein rættiliga gospel-diva. Hon er solistur til konsertir og tiltøk, og hon ferðast eisini runt í Danmark at hava workshop í gospelsangi.

Linda Andrews roynir seg nú eisini við einari fløguútgávu, sum kallast Revelation, og tá hon fer á pallin á Summar Festivalinum, verður tað við einum væl spælandi bólki í rygginum og frálíkum sangum á skránni.

Dømi um tónleikin hjá Lindu Andrews kunnu hoyrast á hennara myspace-síðu.

# Nýggjar poppstjørnur

**Faroe 5 er meira enn bara eitt spæl, og gentubólkurin er nú av álvara til reiðar at stíga inn á føroyska tónleikapallin við framførslu til landsins største tónleikatiltak**

Føroyingar hava havt møguleikan at fylgja við, meðan nýggjur gentubólkur í ár varð settur saman. Upptøkuroyndir vóru til gentubólkin fyrr í ár, og nógvar evnaríkar føroyskar gentur hildu seg fram at. Fimm gentur vórðu valdar burtur úr rúgvuni, og tær gjørdust til bólkin Faroe 5.

Fyrsta tónleikaliga útspælið frá Faroe 5 hevur givið bólkinum gjøgnumbrotið, sum tað næstan ikki slapst undan, tá ið hugsað verður um, hvørjir menninar eru, ið stílað fyri. Kári Jacobsen og Eyðfinn Jensen hava áður arbeitt saman um tónleik, og tað hevur riggað stak væl.

Tað gjørdi tað eisini hesaferð, og sangurin Bara 1 spæl er blivin eitt søtt summarhitt í Føroyum.

Tær fimm poppdiddurnar hava havt onkra einstaka framførslu higartil, men á Summar Festivalinum fáa tær veruliga møguleikan at spæla fyri einari stórari áhoyrarafjøld, nú fólk eisini kenna teirra tónleik.

Tær fimm í Faroe 5 eru Jónvá Ellingsgaard, Lillian Dalsgaard, Asta Højgaard, Ragnhild Dam og Vígdis Fjallstein.

